

AFTUR TIL JOURNALISTIK

*Jón Brian Hvidtfeldt valdi heldur at verða »degraderaður« til tíðindamann, enn at verða uppsagdur sum tíðindaleiðari. Fyri Kringvarpið er prísurin fyri friðin, at tey mugu gjalda Jón Briani eina »ávísa fíggjarliga kompensatión«*

*Savnsmynd*

# Málið um Jón Brian loyst

**SEMJA** Drúgva málið um uppsøgnina av tíðindaleiðaranum í Kringvarpinum, Jón Brian Hvidtfeldt, er nú loyst. Báðir partar gera nøkur indrømmilsir, og Jón Brian Hvidtfeldt verður vanligur tíðindamaður við »ávísari fíggjarligari kompensatión«

Rógvi Nybo

Um vikuskiftið er semja gjørd millum fyrrverandi tíðindaleiðaran í Kringvarpinum, Jón Brian Hvidtfeldt, og leiðsluna í Kringvarpi Føroya.

Semjan inniber, at Jón Brian Hvidtfeldt kærur sínar um uppsøgnina aftur, og at hann tekur av tilboðnum um at gerast vanligur tíðindamaður í Kringvarpinum. Hann byrjaði í tí starvinum í morgun.

Sambært stjóranum í Kringvarpi Føroya, Anniku Mittún Jacobsen, skuldi ikki meira til enn tað, at Jón Brian Hvidtfeldt hevur tikið av tilboðnum um at gerast vanligur tíðindamaður, sum hevur staðið honum í boði allan apríl mánað.

> **Báðir partar gera nøkur indrømmilsir**
>
> *- Jón Brian Hvidtfeldt*

Tá Jón Brian Hvidtfeldt verður spurdur, hvat tað var, sum brádliga fekk knútin at loysna, ásannar Jón Brian Hvidtfeldt, at talan er um eina semju, sum inniber, at báðir partar skulu fáa eitt sindur burturúr tí.

- Tað, sum hetta í veruleikanum merkir er, at báðir partar gera nøkur indrømmilsir, at Kringvarpið tekur uppsøgnina aftur og kæran, sum hevur ligið í Mentamálaráðnum í longri tíð dettur burtur, og at eg sigi meg úr starvi sum tíðindaleiðari og taki við sum tíðindamaður, sigur Jón Brian Hvidtfeldt.

Spurdur, hvørt hetta merkir at hann heldur fram sum tíðindamaður við leiðaraløn, ásannar hann at semjan fyri hansara viðkomandi eisini inniheldur eina »ávísa fíggjarliga kompensatión« sum hann málber seg, uttan at vilja koma nærri inn á smálutirnar í hesum.

## Fýra mánaðir við stríði

Málið um Jón Brian Hvidtfeldt byrjar í seinastu vikuni í farna ári, tá hann fær eitt ætlanarskriv um uppsøgn sum tíðindaleiðari í Kringvarpi Føroya.

Uppsøgnin varð grundað á, at Jón Brian Hvidtfeldt skuldi havt nýtt ov nógvan pening í triðja ársfjórðingi í fjør, at kringvarpsstjórin ikki hevði álit á, at Jón Brian Hvidtfeldt megnaði at reka tíðindadeildina fyri

> **Jón Brian hevur tikið av tilboðnum, sum hevur staðið honum í boði alla tíðina**
>
> *- Annika Mittún Jacobsen*

tann pening, hon hevði sett av til endamálið í 2010, og at tað skuldu vera samstarvstrupulleikar millum tíðindaleiðaran og kringvarpsstjóran.

Flestu tíðindafólkini í Kringvarpinum vístu beinanvegin tíðindaleiðaranum sín stuðul, umframt at felagið Føroysk Miðlafólk eisini bakkaði uppsagda tíðindaleiðaranum upp við moralskum stuðuli og ókeypis løgfrøðiligari ráðgeving. Tann 21. januar valdi Jón Brian Hvidtfeldt at kæra kringvarpsstjóran fyri Kringvarpsstýrið fyri at fráseta mannagongdir í samband við uppsøgnina.

Síðani hevur málið staðið, og Jón Brian Hvidtfeldt hevur havt í boði at taka av tilboðnum sum vanligur tíðindamaður ella at fara úr Kringvarpi Føroya. Valið fall á tað fyrra.

## Gleðir seg at sleppa í gongd

Eftir fýra mánaðir í stríði byrjaði Jón Brian Hvidtfeldt aftur í Kringvarpi Føroya í morgun. Og fyrrverandi tíðindaleiðarin sigur seg fegnast um at málið er loyst.

- Ja, hetta hevur tikið fýra mánaðir. Hetta hevur verið eitt sindur hart og eg má takka Føroysk Miðlafólk, sum hevur verið ein dyggur stuðul upp á allar mátar gjøgnum hesa tíðina. Nú gleði eg meg at sleppa í gongd við at gera journalistikk aftur, staðfestir Jón Brian Hvidtfeldt.

Hann viðgongur, at hann hevði kannað, hvørjir møguleikar lógu aðrastaðni í miðlaheiminum, men at hann í síðsta enda valdi at taka av tilboðnum í Kringvarpinum.

Eisini Annika Mittún Jacobsen fegnast um, at friður nú er við hesum málinum.

- Eg eri glað fyri, at vit nú kunnu konsentrera okkum um at halda tær public service skyldur, sum Kringvarp Føroya hevur, sigur kringvarpsstjórin.

rogvi@sosialurin.fo